# - Pápi fær ikki neyðugu røktina

**Ein av teimum, ið hevur ein av sínum allarkærastu á røktar- og umlættingarheiminum Lágargarði, er Elin Reinert Planck. Hon sigur, at tað kenst ógvuliga svárt, nú pápi hennara og hini búfólkini verða svikin av landsmyndugleikunum.**

Sparingar
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Á fundi á Lágargarði mánakvøldið vóru avvarðandi hjá búfólkunum á stovninum kunnað um, hvørjar avleiðingar tað fer at hava, nú stovnurin hevur fingið álagt at fremja umfatandi sparingar. Tey okkurt um hálvthundrað fólkini, ið vóru á fundinum, fingu ein skelk, tá ið tey frættu, at sparingarnar fara at hava við sær, at teirra kæru nú millum annað noyðast at liggja longri í songini, soleiðis at vandin fyri liggisárum og lungnasjúkum veksur.

### Ógvuliga kensluborið

Ein av teimum avvarðandi er Elin Reinert Planck, hvørs pápi er búfólk á Lágargarði. Elin situr eisini í búfólkaráðnum á stovninum, og hon dylur ikki fyri, at tað er ógvuliga kensluborið at frætta um sparingarnar.

- Sum avvarðandi avlevera vit okkara allarkærastu á Lágargarð, og vit halda so, at tey fáa tað røkt og umsorgan, ið tey hava tørv á, men vit gerast klókari. Pápi mín fær ikki neyðugu røktina, og tað kenst ógvuliga svárt, tí hann hevur verið virkin alt sítt lív, men nú hevur hann brúk fyri, at onkur tekur hond um seg, sigur Elin Reinert Planck.

Hon leggur afturat, at starvsfólkið á Lágargarði ger alt tað, ið tey eru ment, so at búfólkið skal hava tað so gott sum gjørligt, men tað er avmarkað, hvussu skjótt tey kunnu renna.

- Fólkini, ið starvast innan eldrarøktina gera eitt veldugt arbeiði, men tey verða niðkoyrd av arbeiði, sigur Elin Reinert Planck.

### Veikur bólkur

Sjálv heldur Elin Reinert Planck, at eldraøki er eitt øki, sum er lætt at fremja sparingar á, tí talan er um ein bólk, ið fyri ein stóran part einki talirør hevur, sum kann fara út og gera vart við teirra sjónarmið. Hon heldur eisini, at øki heldur ikki er serliga sjónligt, og nógv av fólkunum, ið verða rakt av sparingunum eru hjálparsleys og fáa ikki kært sína neyð.

Elin Reinert Planck heldur, at minstakravið hjá teimum gomlu á Lágargarði má verða, at tey fáa eitt virðiligt lív á ellisárum, uttan at tað noyðist at verða nakað luksuslív.

- Tíverri tykist tað ikki verða tíð til hetta í løtuni, og tey gomlu verða svikin. Eg haldi, at tað er umráðandi at fokus verður sett á hetta øki, tí fólk flest vita ikki so nógv um hetta øki, sigur Elin Reinert Planck.

### Gevur bakslag

Elin Reinert Planck heldur eisini, at talan er um ógvuliga stuttskygdar sparingar, sum ivaleyst fara at geva bakslag innan stutta tíð.

- Minni tíð verður til at verða um tey gomlu, og hetta fer at hava ávísar avleiðingar, so sum fleiri liggisár, størri vandi fyri lungnasjúkum og meiri. Hetta fer at kosta á øðrum økjum, og tí vænti eg, at sparingarnar bíta seg sjálvan í halan, sigur Elin Reinert Planck.

Hon heldur eisini, at støðugu spariingarnar innan eldraøkið fara at hava við sær, at áhugin fyri at starvast innan hetta øki fer at minka, tí arbeiðsbyrðurnar eru so stórar, og starvsfólkini verða niðurslitin.

Spurd um búfólkaráðið fer at fremja nøkur tiltøk fyri at gera vart við sína ónøgd við sparingarnar, sigur Elin Reinert Planck.

- Vit bíða fyrst eftir, at stýrið fyri Lágargarð fer at hava fund seinnapartin í dag(mánadagin), soleiðis at vit vita, hvat stýrið ætlar sær at gera, sigur Elin Reinert Planck at enda.



*Elin Reinert Planck sigur tað verða ógvuliga kensluborið, at pápi hennara, ið er búfólk á Lágargarði, ikki fær neyðugu røktina, ið hann hevur tørv á orsaka av sparingum hjá landsmyndugleikunum.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Vandin fyri sjúkum økist munandi

**Sparingarnar, ið Lágargarður hevur fingið álagt, fara at hava við sær, at vandin hjá búfólkinum fyri sjúkum økist munandi. Tað sigur Marjun Smith, leiðari á Lágargarði.**

Sparingar
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var lítið hugaligt hjá Marjun Smith, leiðara á Lágargarði, tá ið hon mánakvøldið greiddi avvarðandi hjá búfólkunum á Lágargarði frá, hvørjar avleiðingar sparingarnar, ið stovninum er álagt, fóru at hava fyri búfólki og stovnin.

### Játtanin órealistisk

Lágargarður hevur fingið eina játtan fyri bæði røktar- og umlættingarheimið og dagstovnin upp á umleið 23 milliónir, men hendan játtan er órealistisk, sigur Marjun Smith. Hon sigur, at tað ber ikki til hjá stovninum at halda seg innan hesa játtan, og tí hevur nýtslan higartil í ár verið eitt vet oman fyri játtanina, sigur Marjun Smith.

Men herfyri fekk hon at vita frá meginskrivstovuni hjá Heimarøktini og Serforsorgini, at nýtslan hevur verið góðar 600.000 krónur ov nógv higartil í ár, og hesir pengar skulu sparast inn aftur restina av árinum. Tí er neyðugt hjá Lágargarði at fremja umfatandi skerjingar.

### Eingin tíð at verða um tey gomlu

Marjun Smith sigur, at ein av avleiðingunum av sparingunum verður tann, at búfólkini fara at liggja meiri í songini enn higartil, og av tí sama fara tey gomlu skjótari at fáa liggisár. Somleiðis fer vandin fyri lungnasjúkum at økjast munandi, tá rørslan hjá teimum gomlu minkast við ikki at sleppa upp at sita.

Leiðarin á Lágargarði sigur, at tá ið tey gomlu ikki koma upp, verða tey, sum skulu matast, at fáa máltíðirnar í songini, og hetta tekur nógv longri tíð.

- Í stuttum kann sigast, at tíðin at verða um tey gomlu als ikki strekkir til, og tí verða starvsfólkini noydd at renna skjótari.

Marjun Smith leggur afturat, at ein onnur avleiðing verður tann, at búfólkini verða undirstimuleraði, tí tíð ikki verður til at aktivera tey. Leiðarin á Lágargarði sigur, at hetta framman undan er ringa samvitskan hjá røktarstarvsfólkunum á stovninum.

Sjálv er Marjun Smith sannførd um, at økta tíðin í songini hjá búfólkunum í longdini fer at hava við sær, at kostnaðurin fyri sárviðgerð veksur, tørvurin á hjálpartólum fer at økjast, og eisini fer tørvurin á serligum madrassum at vaksa.



*Leiðarin á Lágargarði, Marjun Smith, sigur, at sparingarnar, ið stovninum er álagt, fara at hava við sær, at vandin fyri sjúkum millum búfólkini fer at økjast munandi.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*